## Frágreiðing fyri árið 2016 frá nevndarlimi Rithøvundafelagsins í MAJ

Nevndin til virðisløn M.A.Jacobsens helt 4 fundir í 2016 + samskifti umvegis teldupost. Nevndin samdist um ikki at lata nakra virðisløn fyri yrkisbókmentir í ár.

Virðislønin fyri fagrar bókmentir var latin Heðini M. Klein fyri yrkingasavnið *Tað orðið*. Við hesi grundgeving: *Tað orðið* er sjáldsama heilskapað yrkingasavn, sum gjøgnum bønina “Gev mær ...” uttan íhald sóknast eftir tí eina rætta orðinum fyri tað, sum ikki kann sigast. Talan er um eina langa yrking, ið vendir og snarar orðunum, dregur væntað og óvæntað brigdi fram í teimum og fagnar gjøgnum hesar rørslur lívinum, sum tað er. Við sínum serliga tónalagi og serstøku rýtmu leiðir yrkingin lesaran langt inn í tilveruspurningar, sum hava alment gildi. Savnið er ein skaldslig rannsóknarferð inn í tað, sum formar og birtir undir tilvitsku okkara.

Virðislønin fyri mentanaravrik var latin Eilif Samuelsen fyri hesi grundgeving: Eilif hevur halgað sína tíð sum eftirløntur til at geva okkum klassiskar heimsbókmentir á føroyskum máli. Á egnum forlagi hevur hann síðani 2004 givið út 11 bøkur. Við týðing og útgávu av verkum sum Statinum hjá Platon og Politikkinum og Etikkinum hjá Aristoteles úr forna Grikkalandi, Játtanum Augustinusar frá kirkjunnar ungdómi og høvuðsverkum hjá Thomasi Aquinas og Machiavelli úr evropeiskari miðøld hevur Eilif ríkað okkum við heimsspekiligum dýrgripum á móðurmálinum. Eilif hevur harumframt týtt skaldslig verk eftir Abelard, Turgenjev og Lagerkvist til gott og lætt føroyskt mál. Hetta er fyrimyndarligt mentanaravrik.